## Bankastjórarnir hava skyldina

Bankastjórarnir og teir, sum áttu bankarnar, kunnu ikki skáka sær undan tí veruleika, at tað eru teir og og bara teir, sum hava ábyrgdina av tí, sum hendi teimum íslendsku bankunum. Tað segði sviin Mats Josefsson á einum tíðindafundi í Reykjavík í gjár. Íslendska stjórnin hevur biðið Mats Josefsson hjálpa sær við at endurreisa tað íslendska fíggjarkervið, og tað er ikki av tilvild, at valið fall á júst hann. Sviin hevur arbeitt hjá Altjóða Gjaldoyragrunninum í mong ár og hevur drúgvar royndir at endurreisa bankar og fíggjarstovnar.



## Maersk Line søguligt hall

Fellandi flutningsinntøkur gera, at danska reiðaríið Maersk Line missir nógvar milliardir krónur, og eingin bati er at hóma í næstu framtíð. Tað skrivar Børsen í dag. Sambært blaðnum vænta greinarar, at Maersk Line kann fáa upp ímóti sjey milliardum krónum í halli í ár, og tað er óvanliga nógv eftir donskum viðurskiftum. Men hallið kann blíva uppaftur størri. Síðani ársskiftið er flutningsprísurin fallin seks prosent, og hvørt prosent kostar Maersk Line eina milliard krónur um árið, skrivar Børsen.

# Krevja forkláring frá Helenu Dam á Neystabø

**Tinglimir eru so ónøgdir við tað, sum hendir á Vinnuháskúlanum, at fíggjarnevndin nú fer at kalla landsstýriskvinnuna á økinum í loyniligt samráð fyri at fáa hana at svara spurningum og fleiri løgtingslimir krevja høvdið á stjóranum á einum fati**

VINNUHÁSKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Helena Dam á Neystabø og Vinnuháskúlin standa fyri hørðum atfinningum og fleiri tingmenn krevja, at landsstýriskvinnan tekur málið upp og at skúlastjórin verður koyrdur*

Tað er so stórt óskil á Vinnuháskúlanum at tað eigur at fáa avleiðingar.

Tað eru tað fleiri tinglimir sum halda.

Í Løgtinginum mikudagin stóðu Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, og leiðslan á Vinnuháskúlanum í fleiri tímar fyri hørðum atfinningum.

Tinglimir hava funnist harðliga átalað, at tríggir lærarar á Vinnuháskúlanum hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn og nú vildu teir hava eina forkláring frá landsstýriskvinnuni.

Hetta fingu fleiri tinglimir ikki at stemma, tí lønarjáttanum hjá skúlanum varð hækkað munandi í ár.

Og tað fekk fleiri tingmenn at krevja, at leiðslan á skúlanum eigur at fara frá.

Men í Løgtinginum kom fram, at ein orsøk til tað er, at Vinnuháskúlin hevur flutt pening frá lønarjáttanini til raksturin og so manglaði í til lønirnar.

Hetta vildu fleiri tinglimir als ikki finna seg í og tað vóru meiri enn ein, ið róðu framundir, at hetta eigur at kosta skúlastjóranum á Vinnuháskúlanum starvið.

Men fíggjarnevndin hjá Løgtinginum hevur eisini gjørt av at Helena Dam á Neystabø skal boðsendast í loyniligt samráð í nevndini fyri at fáa greiði á fíggjarliga standinum á vinnuháskúlanum.

Helena Dam á Neystabø fegnaðist um, at hon nú skal í samráð við fíggjarnevndini, so at hon til fulnar fer greitt frá viðurskiftunum og tí rætta samanhanginum í friði og náðum.

### Brúkt til onnur endamál

Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarmálum, sigur, at orsøkin er, at vinnuháskúlanum og landsstýriskvinnan og mentamálum hava ikki biðið um hækkaða játtan til rakstur.

- Tað, sum er hent, er, at lønarjáttanin er hækkað, men at pengarnir skulu brúkast til onnur endamál og tað ber ikki til, sigur Anfinn Kallsberg.

Tórbjørn Jacobsen, úr Tjóðveldinum, sigur, at her er játtanin til lønir brúkt til onnur endamál, er tað ímóti Løgtingsins vilja og tað hava skúlastjórin og landsstýriskvinnan ábyrgdina av.

Kári á Rógvi úr Sjálvstýrisflokkinum, mælti beinleiðis landsstýriskvinnuni til at rudda upp í leiðsluni á skúlanum.

Karsten Hansen er líka barsagdur. Hann spurdi um landsstýriskvinnan meinar tað í álvara, at hon góðtekur, at pengar, sum Løgtingið játtar til eitt ávíst endamál, í hesum føri til lønir, verða brúktir til heilt onnur endamál.

Men góðtekur hon tað ikki, hvat ætlar hon so at gera, spurdi hann.

- Eg veit, hvat eg hevði gjørt, legði Karsten Hansen afturat.

Partamaður hansara, Jenis av Rana, var samdur í, at leiðslan eigur at fara frá, tí tað, sum er hent, er, at skúlin hevur framt svik ímóti Løgtinginum.

Annita á Fríðriksmørk úr Tjóðveldinum, ráddi Helenu Dam á Neystabø um ikki at forsvara støðuna á Vinnuháskúlanum.

- Her er tilvitað meiri og meiri tikið av lønarjáttanini og flutt á raksturin og avleiðingin er, at nú mugu fólk sigast upp og tað kann ikki forsvarast.

Helena Dam á Neystabø forsvarar ikki tað, sum er hent, men hon staðfestir, at hetta hevur verið støðan á og nógvum stovnum hon er longu farin undir at kannað, um hetta hevur verið ein afturvendandi arbeiðsháttur á Vinnuháskúlanum.

Tinglimir átalaðu eisini, at Vinnuháskúlin hevur brúkt yvir 800.000 til lýsingar hesi seinastu trý árini.

Helena Dam á Neystabø vísti á, at hetta var tí, at nemingatalið hevði svikið, men at metingin var, at lýsingarnar høvdu hjálpt. Samstundis hevði skúlin skift samleika og tað hevur eisini kostað.

# Søguliga lágur búskapur

FÍGGJARKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fallið í meðal bruttotjóðarf ramleiðsluni í euro-økinum var í fjórða ársfjórðingi 1,5%, sum er væl meiri enn væntaða 1,3%.

Sambært tíðindastovuni Bloomberg er talan um størsta ársfjórðingsliga fall seinastu 13 árini. Hetta er enn eitt tekin um, at niðurgongdin breiðir seg í 10 ára gomla euro-økinum.

Samstundis leggja nýggju tølini stórt trýst á Europeiska Miðbankan (ECB) at lækka rentuna enn meira. Lækkar ECB rentuna enn meira verður talan um avgjørt rentu-botnmet.

BTÚ hjá Týskalandi fall við heilum 2,1% og eisini franski búskapurin hevur tað ringt við einum falli fjórða ársfjórðing við 1,2%. Bretland fall 1,5% í fjórða ársfjórðingi, og eisini hjá Spania, Italia, Hollandi og Eysturríki stendur illa til.

- Tølini vísa heilt týðiliga, at búskaparliga kreppan av álvara hevur rakt Europa í endanum av 2008 sum ein avleiðing av fíggjarkreppuni. Bæði brúkarar og fyritøkur bundu um heilan fingur og skóru munandi niður á nýtslu og íløgur, skrivar yvirbúskaparfrøðingur hjá Sydbank, Jacob Graven í sínari analysu, veit boersen.dk at siga.



*Europeiski búskapurin er søguliga lágur í løtuni*